Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 9. september 2020
Mál nr.: 20/00477-1
Málsviðgjørt: jd
Eftirkannað: 27. august 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)
(Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020, verður aftaná § 18 sett:

"**§ 18a**. Fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing kann landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið við kunngerð avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1, 2 og 4, undir hesum eisini steingja matstovur og skeinkingarstøð, eins og landsstýrismaðurin kann áseta mest loyvda tal av gestum. Landsstýrismaðurin kann áseta, at avmarkingarnar bara galda ávís sløg av virksemi, fevnt av løgtingslógini.
Stk. 2. Heimildin at avmarka upplatingartíðir og afturlatingartíðir eftir stk. 1 er ikki galdandi fyri matsølu frá føstum sølustaði, sbr. § 1, stk. 3, nr. 7, treytað av, at talan ikki er um borðreiðing eftir § 1, stk. 3, nr. 10.
Stk. 3. Ger landsstýrismaðurin av at avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevur matstovan ella skeinkingarstaðið rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Umsitingarligu reglurnar í §§ 6-11 í løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 verða nýttar samsvarandi. Stuðulstíðarskeiðið og tilvísingartíðarskeiðið fyri matstovur og skeinkingarstøð verður tó ásett í kunngerðini sbrt. stk. 1."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2020.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tíðaravmarkaða heimild landsstýrismansins at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum og skeinkingarstøðum og at áseta mesta tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri COVID-19 smittuspjaðing, fór úr gildi 31. august 2020, sbrt. løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020 um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin).

Eins og frammanundan verður hildið, at tørvur er á at hava heimild at seta í verk tiltøk at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing. Ein av hesum heimildum er at avmarka upp- og afturlatingartíðir fyri matstovur og skeinkingarstøð og at áseta mesta tal av gestum. Talan kann eisini gerast um heilt at steingja matstovur og skeinkingarstøð, um støðan við COVID-19 ger tað neyðugt.

Eins og í løgtingsmáli nr. 149/2019 skal Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísa á, at farsóttarlóggávan er danskt málsøki, sbr. § 1, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini. Ásetingar, sum snúgva seg um at forða fyri smittuspjaðing, eiga tískil at verða ásettar í farsóttarlóggávuni og ikki í føroyskari serlóg.

Lógartænastan hevði í sambandi við lógareftirkanningina av løgtingsmáli nr. 149/2019 hesa viðmerking:

Lógartænastan skal [...] viðmerkja, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er danskt málsøki (regulerað í epidemilógini). Endamálið við epidemilógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. [...]

Lógartænastan skal við hesum vísa á, at tað er ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar, sum beinleiðis hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, soleiðis sum lagt er upp til, av tí at málsøkið er danskt. Harumframt skal viðmerkjast, at tað er ivasamt, um matstovulógin, hvørs endamál yvirskipað er at skipa matstovuvirksemi o.s.fr. í Føroyum, og sum ikki hevur heilsulig ella onnur endamál, er rætta stað at hava eina áseting um at forða fyri smittuspjaðing.

1.2. Galdandi lóggáva

Matstovulógin heimilar ikki landsstýrismanninum at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum o.tíl. fyri at forða fyri smittuspjaðing.

Eftir § 18, stk. 2, sum varð sett inn í matstovulógina við løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020, hevði matstovan ella skeinkingarstaðið rætt til stuðul eftir løgtingslóg nr. 97 frá 23. juni 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (eftir hetta stuðulslógin), um landsstýrismaðurin gjørdi av at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar til áðrenn kl. 02:00 ella at minka mest loyvda tal av gestum.

Henda tíðaravmarkaða heimild landsstýrismansins at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum og skeinkingarstøðum og at áseta mesta tal av gestum fór úr gildi 31. august 2020.

Eftir galdandi kunngerðini um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (eftir hetta stuðulskunngerðin), kann veitast stuðul til ferðavinnufyritøkur,

undir hesum matstovum og skeinkingarstøðum fyri fastar útreiðslur í tíðarskeiðinum 12. mars 2020 til 31. august 2020, grundað á afturgongd í umsetningi í sama tíðarskeiði.

Stuðul kann sostatt veitast matstovum og skeinkingarstøðum fyri fastar útreiðslur í nevnda tíðarskeiði, grundað á afturgongd í umsetninginum í sama tíðarskeiði. Fyri skeinkingarstøð er tað tó ein treyt, at avgerð er tikin eftir tá galdandi § 18, stk. 2 í matstovulógini. Hetta er ikki ein treyt viðvíkjandi matstovum, sum eru fevndar av kunngerðini, eisini uttan avgerð eftir tá galdandi § 18, stk. 2.

Stuðulsupphæddin er 75%, um afturgongdin í umsetninginum er 60-100%, og 50%, um afturgongdin í umsetninginum er 40-60%. Tó verður eisini veittur stuðul til fyritøkur, sum ikki hava havt umsetning í einum samanberingartíðarskeiði.

Í stuðulslógini er ásett loft upp á 10 mió. kr. í stuðulsupphædd fyri hvørja fyritøku. Tað er eisini galdandi, tá talan er um fleiri fyritøkur í eini samtøku, tó ikki fyri ferðafólkaflutning millum lond.

Sambært fyrr galdandi § 18, stk. 2 í matstovulógini byrjar stuðulstíðarskeiðið fyri matstovur og skeinkingarstøð tó, tá ið avgerð varð tikin um at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar.

Matstovur fáa, eisini uttan avgerð um at avmarka upp- og afturlatingartíðir eftir ásetingini í fyrr galdandi § 18, stk. 2 í matstovulógini, stuðul eftir stuðulslógini, og stuðulstíðarskeiðið hjá matstovum er tí eisini 12. mars 2020 til 31. august 2020 og samsvarandi tilvísingartíðarskeið 2019.

Skeinkingarstøð eru bert fevnd av stuðulskunngerðini, um avgerð varð tikin um at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar. Eftir stuðulskunngerðini er tí ásett eitt serligt stuðulstíðarskeið fyri skeinkingarstøð, ið er frá 7. august 2020 til og við 31. august 2020 og samsvarandi tilvísingartíðarskeið 2019.

Um ein fyritøka hevur afturgongd í umsetninginum aftan á 31. august 2020 orsakað av tiltøkum eftir 31. august 2020 eftir matstovulógini, er ikki heimild at veita stuðul eftir stuðulslógini fyri tiltøk, sum eftir 31. august 2020 eru framd eftir matstovulógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið hevur til endamáls at geva landsstýrismanninum heimild at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum o.tíl. fyri at forða fyri smittuspjaðing.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við broytingini fær landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið heimild at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1-2 og stk. 4. Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at minka mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing.

Samstundis, sum heimild landsstýrismansins verður ásett av nýggjum, verður ásetingin nágreinað soleiðis, at greitt er, at matsøla frá føstum sølustað (take away) ikki er fevnd av ásetingini. Hetta er grundað á, at matsøla frá føstum sølustað meira er at meta sum vanligt keyp og ikki sum ein vitjan á eini matstovu ella einum skeinkingarstaði, og at endamálið við ásetingini er at forða fyri, at ov nógv fólk savnast á matstovum og skeinkingarstøðum.

Leggjast kann í hesum sambandi afturat, at matsøla frá føstum sølustaði ikki kann fáa skeinkiloyvi eftir reglunum í matstovulógini.

Um ein fyritøka hevur afturgongd í umsetninginum, orsakað av tiltøkum eftir § 18a, stk. 1 í uppskotinum, hevur fyritøkan eftir § 18a, stk. 3 í uppskotinum rætt til stuðul eftir stuðulslógini. Eftir stuðulslógini endar stuðulstíðarskeiðið 31. august 2020. Tað er tó ikki neyðugt at broyta stuðulstíðarskeiðið og tilvísingartíðarskeiðið í stuðulslógini við tað, at stuðulstíðarskeiðið og tilvísingartíðarskeiðið verða broytt við kunngerðini sbrt. § 18a, stk. 3, sbr. stk. 1 í uppskotinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar, men Ferðavinnufelagið hevur latið Umhvørvis- og vinnumálaráðnum hjálagda skriv.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið heimild at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar og at minka mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing. Tað verða sostatt bert avleiðingar fyri landið, um heimildin í lógaruppskotinum verður nýtt.

Verður mett neyðugt at nýta heimildina í kunngerð at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar hjá matstovum og skeinkingarstøðum, hava hesar fyritøkur rætt til stuðul eftir somu reglum, sum eru ásettar í stuðulslógini. Stuðulstíðarskeiðið verður ásett í kunngerðini.

Ilt er at meta um, hvat samlaði kostnaðurin av hesum verður, tí í løtuni ber ikki til at siga, um kunngerðarheimildin verður brúkt, eins og tað ikki ber til at siga, hvussu nógv hon verður brúkt. Ein varlig meting er tó 1-2 mió. kr.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki umsitingarligar fyri land og kommunur, sbr. viðmerkingarnar undir pkt. 2.1.

Verður mett neyðugt at nýta heimildina í kunngerð at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar hjá matstovum og skeinkingarstøðum, skal landið viðgera og avgreiða umsóknir um stuðul til fastar útreiðslur.

Við stuðulslógini fekk landsstýrismaðurin heimild til, eftir avtalu við viðkomandi landsstýrismann, at leggja umsitingina av og eftirlitið við stuðulsskipanini til stovn undir avvarðandi landsstýrismanni. Henda uppgáva varð løgd til TAKS, sum umsitur hesa og aðra COVID-19 stuðulslóggávu. Hóast talan um er endurnýggjaða heimild (at avmarka upp- og afturlatingartíðir), er í umsitingarligum høpi talan um framhald av verandi skipan. Trupult er at meta um, hvussu umfatandi henda uppgáva verður, men royndir við aðrari COVID-19 stuðulslóggávu vísa, at talan er ikki um umfatandi arbeiði. Mett verður tískil, at talan verður um eina uppgávu, ið er avmarkað í vavi.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki í sjálvur sær ikki avleiðingar fyri vinnuna, sbr. viðmerkingarnar undir pkt. 2.1.

Verður mett neyðugt at nýta heimildina at avmarka upp- og afturlatingartíðir, minka inntøkurnar hjá matstovum og skeinkingarstøðum, sum tá hava rætt til stuðul fyri fastar útreiðslur. Mest sannlíkt verður kortini talan um eitt nettotap.

Fyri vinnuna hevur uppskotið ta umsitingarligu avleiðing, at matstovur og skeinkingarstøð, ið verða fevnd av eini møguligari afturlating, skulu søkja um stuðul fyri fastar útreiðslur.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Hetta hevur kortini ikki týdning í hesum máli. Aðrir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, men í matstovulógarinnar § 23, stk. 2, nr. 2 er ásett, at við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir løgtingslógini ella eftir reglum, givnar við heimild í løgtingslógini.

Heimild landsstýrismansins í § 18a, stk. 1 at avmarka upp- og afturlatingartíðir, undir hesum eisini at steingja matstovur og skeinkingarstøð, og at áseta mest loyvda tal av gestum, er fevnt av ásetingini í § 23, stk. 2, nr. 2, og tað er tískil revsivert, um boð landsstýrismansins eftir § 18a, stk. 1 ikki verða aktað.

Um revsing eftir matstovulógini annars kann nevnast, at brot á lógina, reglur, givnar við heimild í lógini, og brot á treytir í skeinkiloyvum ella øðrum loyvum ella góðkenningum,

givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, verða revsað við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir. Á sama hátt verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini. Afturat hesum verður ásett, at revsingin kann herðast til fongsul í upp í 1 ár, um brotið er framt tilvitað ella av grovum ósketni, ella um talan er um endurtakandi brot.

Mál um brot á lógina og brot á reglur, givnar við heimild í lógini, verða viðgjørd sum politimál. Hetta merkir, at politiið kann avgreiða mál við sektaruppskoti og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstøkum broti. Fortreytin er tó, at tann skuldsetti uttanrættarliga játtar seg sekan í brotinum og góðtekur at rinda ásettu sektina. Tað er eisini ein fortreyt, at sektarstøðið frammanundan er staðfest av dómstóli, og tí kunnu brot á boð, sum landsstýrismaðurin gevur eftir § 18a, stk. 1, ikki avgreiðast við sektaruppskoti, fyrr enn rætturin hevur tikið støðu til sektarstøðið.

Ásett er eisini, at tey í bekendtgørelse af lov for Færøerne om rettens pleje (rættargangslógin) nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini. Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 1-2, ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, skal fyrilit havast fyri fíggjarliga vinninginum, sum er fingin ella ætlaður var at fáa við brotinum.

Somuleiðis er ásett, at tann, sum stendur fyri virksemi eftir hesi lóg, kann verða revsaður við sekt fyri brot á ávísar ásetingar uttan mun til, um brotið er framt av starvsfólki og uttan mun til, um brotið er tilætlað ella framt av grovum ósketni. Í hesum føri verður sostatt ásett víðkað ábyrgdargrundarlag hjá tí, sum stendur fyri virkseminum (objektiv ábyrgd). Henda víðkaða ábyrgd er ikki treytað av, at viðkomandi sjálvur hevur brotið reglurnar ella hevur vitað, at reglurnar vórðu brotnar (subjektiv ábyrgd/culpa).

Uppskotið hevur ikki aðrar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar sum skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til fyribils og í avmarkað tíðarskeið við boðum ella í kunngerð at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar, sum eru ásettar í § 17, stk. 1, 2 og 4.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
§ 18a, stk. 1
Fyri at forða fyri smittuspjaðing av COVID-19 kann landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1-2 og stk. 4, undir hesum eisini steingja matstovur og skeinkingarstøð. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin áseta mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing.

Ásett verður, at landsstýrismaðurin kann áseta, at avmarkingarnar bara galda ávís sløg av virksemi fevnd av løgtingslógini. Hetta merkir, at alt eftir hvussu støðan við COVID-19 verður, kunnu avmarkingarnar setast fyri alt virksemi, sum er fevnt av løgtingslógini ella bara fyri ávikavist matstovuvirksemi ella skeinkingarvirksemi.

Henda heimild landsstýrismansins er avmarkað á tann hátt, at hon bara loyvir landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð ella avmarka ta vanligu upp- og afturlatingartíðina og/ella áseta mest loyvda tal av gestum fyribils og í avmarkað tíðarskeið. Hetta er grundað á, at talan er um eina serliga støðu, og at tað er umráðandi, at avmarkingarnar, sum verða ásettar, eru proportionalar í mun til støðuna.

§ 18a, stk. 2
Ásetingin í stk. 2 nágreinar, at matsøla frá føstum sølustað (take away) ikki er fevnd av heimildini at avmarka upp- og afturlatingartíðir.

Endamálið við heimildini at avmarka upp- og afturlatingartíðir er at forða fyri, at ov nógv fólk savnast á matstovum og skeinkingarstøðum. Matsøla frá føstum sølustað er ikki at meta sum ein matstova, og tí er slík matsøla ikki fevnd av vanligu upp- og afturlatingartíðunum í § 17. Hetta er kortini treytað av, at talan veruliga er um matsølu, har maturin verður tikin við út úr hølunum og etin aðrastaðni. Summar matsølur hava rúm fyri, at fólk eta á staðnum, t.d. við at hava einstøk borð. Kortini er ikki talan um matstovu, og tí er umráðandi, at matsølurnar skipa virksemið soleiðis, at tilmælini um frástøðu verða hildin, bæði tá ið bílagt verður, og um etið verður á staðnum.

§ 18a, stk. 3
Skotið verður upp, at ger landsstýrismaðurin av at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevur matstovan ella skeinkingarstaðið rætt til stuðul eftir stuðulslógini. Tað fevnir eisini um umsitingarligu reglurnar, og reglurnar, sum eru settar sbrt. stuðulslógini.

Eftir uppskotinum verður stuðul bert veittur, um landsstýrismaðurin við kunngerð ásetur avmarkingar í vanligu afturlatingartíðunum ella at minka mest loyvda tal av gestum.

Skotið verður tí upp, at um landsstýrismaðurin við kunngerð sbrt. stk. 1 í uppskotinum ásetur avmarkingar í vanligu afturlatingartíðunum ella at minka mest loyvda tal av gestum, kann hann samstundis fyri matstovu og skeinkingarstøð áseta nýtt stuðulstíðarskeið og tilvísingartíðarskeið.

Tað hevur við sær, at tað eisini kann verða veittur matstovum og skeinkingarstøðum stuðul eftir stuðulslógini og reglum, settar sbrt. stuðulslógini fyri fastar útreiðslur, sum fyritøkurnar hava havt eftir 31. august 2020, tó ikki eftir 31. desember, tá lógin fer úr gildi.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr aftur gildi 31. desember 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 9. september 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Fylgiskjøl
Fylgiskjal 1: Skriv frá Ferðavinnufelagnum